UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 22. august 2017
Vmr. J.Nr.: 17/00425-2

Viðgjørt: Klik her for at angive tekst.

**Løgtingsmál nr. /2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um P/F Visit Faroe Islands**

## Uppskot til
## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um P/F Visit Faroe Islands

**§ 1.**

Í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2014 um P/F Visit Faroe Islands verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 2 verður orðað soleiðis:
"**§ 2.** P/F Visit Faroe Islands hevur til endamáls at samskipa, menna og marknaðarføra Føroyar sum ferðafólkaland."

**2.** § 7 verður orðað soleiðis:
"**§ 7.** P/F Visit Faroe Islands kann í samstarvi við kommunur, kunningarstovur og privat seta í verk menningartiltøk í ferðavinnuni.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn veita menningarverkætlanum í ferðavinnuni fíggjarligan stuðul.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann lata P/F Visit Faroe Islands umsita stuðulsskipanina.

**§ 2.**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2018.

GONGIN 7 • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 00 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: UVMR@UVMR.FO

# Viðmerkingar til lógaruppskotið

## Kap. 1. Almennar viðmerkingar

### 1. Endamálið við lógini

Lógin hevur til endamáls at seta í verk skipaða ferðavinnumenning, ið P/F Visit Faroe Islands skal standa á odda fyri.

Í mai mánaði 2017 varð heildarætlanin "Ferðavinna í Føroyum – ein ábyrgdarfull og burðardygg leið" latin úr hondum. Heildarætlanin, ið er at finna sum viðfest skjal til lógaruppskotið, hevur eina røð av tilmælum um, hvussu tað ber til at tryggja eina betur skipaða og burðardygga ferðavinnu í Føroyum.

Tað er millum fremstu tilmæli arbeiðsbólksins, at bygnaðurin í ferðavinnuni verður endurskoðaður. Yvirskipaða grundgevingin er, at tað er ein grundleggjandi fortreyt fyri menning í ferðavinnuni, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið - og við tí eisini bygnaðurin - er greitt. Er hendan fortreyt ikki til staðar, ber illa til at samskipa ferðavinnuna, at skapa neyðugu samstørvini og at seta í verk tiltøk, sum geva neyðuga úrslitið. Hetta lógaruppskot hevur til endamáls at fremja ta nýskipan í ferðavinnubygnaðinum, sum heildarætlanin leggur upp til.

Niðanfyri verður ætlaða umskipanin lýst í høvuðsheitum. Ein meiri gjøllig lýsing er at finna í áðurnevndu heildarætlan, skjal 1.

*Tørvur á bygnaðarbroytingum innan ferðavinnuna*
Ferðavinnan í Føroyum hevur staðið í støðugum vøkstri seinastu árini, m.a. orsakað av miðvísu marknaðarføringini uttanlands, ið P/F Visit Faroe Islands hevur staðið á odda fyri. Avgerandi grundarlagið undir marknaðarføringararbeiðinum er, at politiska skipanin hevur raðfest uppgávuna og givið P/F Visit Faroe Islands neyðugu karmarnar at virka undir, ikki minst fíggjarliga.

Marknaðarføringin hevur borið so mikið góðan ávøkstur, at líkt er til, at langtíðarmálini um m.a. at røkka einum umsetningi í vinnuni upp á 1 mia. kr. og 200 tús. gistingar árliga verða rokkin til tíðina. Ferðavinnuvøksturin er nú vorðin týðiligur í føroyska samfelagnum, og hetta sæst m.a. aftur í teimum mongu nýggju matstovunum og gistingarmøguleikunum og økta frítíðarvirkseminum kring landið. Ferðavinnan er við øðrum orðum um at gerast ein týðandi vinna fyri føroyska búskapin; ein vinna, sum neyðugt er at taka í álvara og at stýra miðvíst við menningarátøkum, íløgum og samskipan.

Umskipanin, sum hetta lógaruppskotið leggur upp til, skal tryggja, at at m.a. bygnaðurin og stuðulsskipanirnar í ferðavinnuni verða dagførd soleiðis, at landið er betur ført fyri at taka við teimum nýggju avbjóðingunum og møguleikunum, ferðavinnan skapar.

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
Telefon 30 66 00• Telefax 30 66 65 • E-mail: uvmr@uvmr.fo

*Endurskoðaðar stuðulsskipanir*
Avmarkaða játtanin, sum í dag verður latin sum stuðul til ferðavinnuna (t.e. játtanin til økisferðavinnu og krónu fyri krónu stuðulin), verður ikki nýtt nóg skilagott í dag. Galdandi skipan hevur við sær, at játtanin upp á uml. 1,5 mió. kr. til økisferðavinnustuðul verður býtt sundur í 6 eins stórar partar, soleiðis at hvørt øki, óheft av stødd, virksemi ella førleika, fær 240 tús. kr. at ráða yvir. Peningurin, sum verður fluttur teimum 6 økisferðavinnufeløgunum, verður síðani í flestu førum fluttur kunningarstovunum í avvarðandi øki, sum brúka peningin sum part av vanliga rakstrinum (t.e. til løn, umsiting o.tíl.).

Avbjóðingin við galdandi stuðulsskipan er partvíst, at hon er við til at halda fast í einum ógreiðum bygnaði og ábyrgdarbýti. Hóast talan er um stuðulsupphæddir, sum eru lutfalsliga lágar, hevur sjálv skipanin avgerandi týdning fyri, hvussu bygnaðurin í ferðavinnuni er. Tað er t.d. orsakað av stuðli frá landinum, at økisferðavinnufeløgini av fyrstan tíð vórðu sett á stovn. So leingi stuðulin verður veittur hesum feløgum, er sannlíkt, at tey verða varðveitt, hóast tað í fleiri førum er ynskiligt at skipa virksemið øðrvísi.

Av tí at kunningarstovurnar í fleiri førum mugu fáa fígging til vega frá ymsum pørtum, t.e. frá kommununum, við privatari sølu og við stuðli frá landinum, er tað ógreitt, hvør hevur endaligu ábyrgdina fyri virkseminum og rakstrinum á kunningarstovunum. Av tí sama hava fleiri kunningarstovur havt trupulleikar við at fáa nøktandi fígging til raksturin.

Ein onnur høvuðsorsøk til, at stuðulsskipanin verður dagførd, er, at avmarkaði stuðulin hevur ikki ætlaða virknaðin, soleiðis sum hann verður nýttur í dag; harumframt fáa ikki øll øki í landinum lut í stuðlinum.

Kunningarstovurnar røkja eina týðandi uppgávu í ferðavinnuni. Tær veita ferðafólki viðkomandi kunning og vegleiðing í ymsu økjunum, eins og tær eru týðandi samstarvsfelagar, um t.d. nýggj ferðavinnutilboð skulu setast á stovn. Kunningarstovurnar vita um tørvin hjá ferðafólki og um lokalu viðurskiftini og eru soleiðis eisini ein natúrligur samstarvsfelagi, tá ið landið setur tiltøk í verk, ella tá ið tað snýr seg um at samskipa ferðavinnuvirksemið kring landið.

Øll hava áhuga í at fáa greiðari karmar kring virksemið á kunningarstovunum soleiðis, at endamál og virksemi teirra verður greiðari og meiri miðvíst enn tað er í dag.

Endamálið við at umskipa stuðulsskipanirnar er tískil at skapa eitt greiðari uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur í ferðavinnuni. Uppgávan hjá landsmyndugleikunum eigur at vera at skapa neyðugu karmarnar fyri eini vælvirkandi vinnu. Tað verði seg við meginreglum, lóggávu, stuðulsskipanum o.s.fr. Talan er um eina yvirskipaða uppgávu, sum krevur umsitingarliga orku og fígging, so tað verður tryggjað, at karmarnir kring vinnuna eru so skynsamir sum til ber. Uppgávan hjá landinum er við øðrum orðum yvirskipað. Tað verður hinvegin *ikki* mett at vera uppgávan hjá landinum at skipa ferðavinnuna lokalt, so sum galdandi skipan kring økisferðavinnufeløg og kunningarstovur hevur við sær. Landið setir karmarnar og ger lóggávuna og kann hava ráðgeving og stuðulsskipanirnar, sum gera tað lagaligt at skipa nýggj tilboð; tað eru kortini kommunurnar, saman við kunningarstovum, lokala vinnulívinum og eldsálunum í økinum, sum mugu fáa til vega neyðuga infrakervið og gera tað praktiska arbeiðið, sum skal til, fyri at ferðavinnan skal virka. Hetta verður sjálvsagt við vegleiðing, ráðgeving og stuðli frá m.a. P/F Visit Faroe Islands (sí niðanfyri). Ein vælvirkandi ferðavinna sprettir altíð úr lokalumhvørvinum. Tí eigur tað eisini at vera uppgávan hjá kommunum at leggja vinnuna til rættis og at taka avgerð um, hvørji ferðavinnusamstørv eru viðkomandi og hvussu kunningarstovuvirksemið eigur at vera skipað.

Afturat stuðulinum til økisferðavinnufeløg verður í dag eisini latin stuðul til "marknaðarføring uttanlands", sum stuðulskontan eitur, t.e. krónu fyri krónu-stuðulin, sum hann vanliga verður róptur. Endamálið við krónu fyri krónu stuðulsskipanini hevur verið at hjálpa vinnuni við marknaðarføringsátøkum, sum í ein ávísan mun eru uttan fyri vanligu marknaðarføringina hjá vinnuni. Fyrstu nógvu árini var upphæddin á fíggjarlógini 1 mió. krónur, men seinnu árini er upphæddin lækkað til slakar 500.000 kr. Í 2017 er játtanin 475.000 kr. Eftir sum endamálið hjá P/F Visit Faroe Islands nettupp er marknaðarføring uttanlands, er ikki tørvur á enn eini stuðulsskipan við júst sama endamáli. Tørvurin á peningi til menningarátøk innanlands er størri. Tí verður hendan stuðulsskipanin slept, og peningurin verður fluttur nýggju stuðulsskipanini, saman við peninginum, ið áður er latin økisferðavinnufeløgunum.

Umskipanin, sum við lógaruppskotinum verður framd, hevur við sær, at peningurin frá hesum báðum stuðulsskipanunum, t.e. økisferðavinnustuðulin og stuðulin til marknaðarføring uttanlands, verður savnaður í eina nýggja stuðulspulju, sum fer at virka eftir nýggjum treytum. Niðan fyri verður í høvuðsheitum greitt frá, hvussu nýggja stuðulsskipanin skal virka.

*Ferðavinnumenning í P/F Visit Faroe Islands*
Til tess at tryggja, at ferðavinnuvirksemið í Føroyum verður savnað og samskipað soleiðis, at marknaðarføring og menning ganga hond í hond, og at vitan og førleikar verða savnað á einum staði, fær P/F Visit Faroe Islands uppgávuna eisini at standa á odda fyri ferðavinnumenning í Føroyum. Á P/F Visit Faroe Islands er eitt fakligt umhvørvi innan ferðavinnu, og felagið hevur neyðugu styrkina, ið krevst fyri at treingja ígjøgnum við sínum boðskapum - bæði uttanlands og heima. Av tí at marknaðarføring og menning hanga óloysiligt saman, hevur tað við sær stórar fyrimunir, um sama leiðsla hevur ábyrgd av bæði at menna og marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland. Framleiðsla og søla eiga at ganga hond í hond soleiðis, at tað ikki verður ein andsøgn millum tað, ið verður marknaðarført, og móttøkuskipanina innanlands.

Av tí at høvuðsfokus hjá P/F Visit Faroe Islands higartil hevur verið marknaðarføring uttanlands, endurspeglar bygnaðurin í dag teir førleikar, sum krevjast til hesa uppgávu. Við nýggju menningaruppgávuni verður endamál felagsins tvíbýtt, og tí verður neyðugt at seta nýggj fólk við øðrvísi førleikum og egnari játtan til at seta í verk mongu nýggju átøkini, sum skulu til fyri at fáa eina vælvirkandi og effektiva ferðavinnu í Føroyum. Hetta hevur eisini við sær, at endamálsorðingin í § 2 í løgtingslóg um P/F Visit Faroe Islands verður tillagað soleiðis, at lógin endurspeglar ta menningaruppgávu, sum felagið nú eisini skal røkja.

P/F Visit Faroe Islands skal eftir ætlan vera drívmegin fyri ferðavinnumenningini í Føroyum. Tað verður frameftir uppgávan hjá Visit Faroe Islands, saman við landsstýrinum, kommunum, kunningarstovum og privatum aktørum, at savna og samskipa ferðavinnuna og at tryggja, at neyðug átøk verða framd, sum hava við sær, at ferðavinnan verður skipað á burðardyggum grundarlagi kring alt landið.

Til tess at røkka málinum um eina burðardygga ferðavinnu krevst, at ein røð av átøkum verða sett í verk, bæði fyri at menna nýggj ferðavinnutilboð, at skapa neyðuga infrakervið, at framleiða neyðuga vitan og kunningartilfar og fyri at samskipa ferðavinnuvirksemið kring landið soleiðis, at vinnan virkar so skynsamt og effektivt sum til ber.

Tað verða starvsfólkini á P/F Visit Faroe Islands sum koma at avgera, hvussu uppgávan verður skipað á skilabestan hátt. Í skjali 1 hevur arbeiðsbólkurin handan heildarætlanina givið sítt boð uppá, hvussu menningartilgongdin kann leggjast til rættis.

*Ein tvíbýtt stuðulsskipan*
Mett verður, at menningaruppgávan í byrjanini fer at kosta uml. 7 mió. kr. um árið, har mett verður, at uml. 1,5 mió. kr. skal brúkast til ráðgeving, vegleiðing, løn o.a., meðan uml. 5,5 mió. kr. verða settar av til verkætlanir og menningarátøk av ymsum slag kring landið. Mælt verður síðani til, at stuðulin til menningarátøk (uml. 5,5 mió. kr.) verður býttur sundur í tvær puljur. Sí mynd niðanfyri.




Ætlanin er, at onnur puljan skal brúkast til verkætlanir, sum P/F Visit Faroe Islands beinleiðis varðar av og stýrir í samstarvi við kommunur og vinnuna í ymsu økjunum. Peningurin eigur t.d. at fara til verkætlanarsett starvsfólk úti í økinum, sum hava uppgávuna at stuðla og vegleiða pørtum í økinum í mun til ferðavinnumenningina. Partur av arbeiðinum er at orða politikk og ætlanir fyri økini; at skapa góðar karmar um ferðavinnuvirksemið, undir hesum neyðuga infrakervið (t.e. gøtur, kunning, tiltøk o.a.), og at byggja upp lokal ferðavinnusamstørv, sum kunnu vera grundarlag undir eini burðardyggari og væl virkandi ferðavinnu í økjunum.

Hin puljan er ætlað sum ein stuðulsskipan til ferðavinnuverkætlanir kring landið. Endamálið við hesi stuðulspulju er at seta í verk og stuðla nýggjum ferðavinnutilboðum, t.e. til vinnuligar verkætlanir og vørumenning úti í økjunum. Stuðulin eigur at verða latin eftir kr./kr. meginregluni soleiðis, at ein fortreyt fyri at fáa stuðulin er, at kommunan og møguliga eisini lokala vinnan í minsta lagi kemur við helminginum av fíggingini til verkætlanirnar. Kommunurnar eiga sum meginregla at varða av hesum verkætlanum við stuðli og vegleiðing frá Visit Faroe Islands og møguliga verkætlanarsettum starvsfólkum í økinum soleiðis, at tað verður tryggjað, at hesar verkætlanir eru samskipaðar við virksemið, sum annars er í gongd í økinum.

Eftir sum tørvurin á átøkum kann broytast við tíðini, kann tað vera neyðugt at brúka meiri pening til t.d. vinnuligar/kommunalar verkætlanir í eitt tíðarskeið, ímeðan tørvurin á at brúka pening til t.d. infrakervi o.t. somuleiðis kann vera størri aðrar tíðir. Tí verður latið upp fyri, at peningaliga býtið ímillum tær báðar stuðulspuljurnar kann tillagast eftir tørvi.

Broytta stuðulsskipanin hevur við sær, at § 7 í lógini um P/F Visit Faroe Islands, ið heimilar galdandi stuðulsskipan, skal broytast. § 7 ásetur sum nú er í stk. 1, at landsstýrismaðurin kann í samstarvi við kommunur og lokalu vinnuna stuðla økisferðavinnufeløgum fíggjarliga. Somuleiðis er ásett í § 7, stk. 2, at landsstýrismaðurin eftir umsókn kann lata ferðavinnuni stuðul at marknaðarføra Føroyar. Her er talan um áðurnevnda krónu-fyri-krónu stuðulin.

Umskipanin hevur við sær, at § 7 í lógini verður orðað av nýggjum soleiðis, at heimild verður fingin til at lata stuðulin eftir nýggja leistinum. Tað er ætlanin, at P/F Visit Faroe Islands skal umsita stuðulin til menningarátøk sum part av breiðu menningartilgongdini í ferðavinnuni. Sambært § 4 stk. 3 í galdandi lóg er ásett, at tað í sáttmála millum landsstýrismannin og P/F Visit Faroe Islands skal ásetast, hvussu stuðulin til partafelagið skal umsitast. Sostatt verður neyðugt at dagføra galdandi sáttmála millum Vinnumálaráðið og P/F Visit Faroe Islands, soleiðis at hann eisini inniheldur ásetingar um nýggja stuðulin og yvirskipað um nýggja menningarvirksemið á P/F Visit Faroe Islands. Til tess at tryggja, at meginreglurnar um eina nøktandi stuðulsfyrisiting sambært løgtingslóg um landsins játtanarskipan verða fylgdar, verður gjørd ein reglugerð, sum neyvari útgreinar endamálið við stuðlinum sbrt. § 7, hvør móttakaraskarin er, hvussu málsviðgerðin er skipað, hvørjar treytir fylgja við stuðulsveitingini o.s.fr.

Umskipanin, sum er lýst omanfyri, verður sett í gildi 1. januar 2018.Tó verður galdandi stuðulsskipan til økisferðavinnufeløg verandi í gildi til 1. januar 2019 soleiðis, at kunningarstovur, kommunur og økisferðavinnufeløg hava eitt rímuligt skotbrá at laga sítt virksemi til nýggju støðuna. Stuðulin til marknaðarføring uttanlands (krónu-fyri-krónu stuðulin) verður settur úr gildi sum lýst omanfyri frá 1. januar 2018.

**2. Ummæli**

Uppskotið er sent hesum pørtum til ummælis:
Kommunufelagið
Ferðavinnufelagið
P/F Visit Faroe Islands
Økisferðavinnufeløgini
Kunningarstovurnar
P/F Vága Floghavn

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

**1. Fíggjarligar avleiðingar**

**A. Fyri landið**

At byggja upp nýggja menningarvirksemið krevur í fyrstu syftu, at økið verður raðfest við eini eyka játtan, sum verður inntøkufíggjað við at fremja broytingar í ferðagjaldinum. Víst verður í hesum sambandi til uppskotið um at broyta lógina um ferðagjald. Mett verður, at ein játtan á 5

mió. kr. er hóskandi at byrja við, so nýggja deildin hevur nøktandi játtan til munagóð menningarátøk kring landið.

Afturat teimum 5 mió. kr. á fíggjarlógini leggur umskipanin í øðrum lagi upp til, at tær írestandi 2 mió. kr. koma frá umskipan av økisstuðlinum og frá krónu-fyri-krónu stuðlinum. Økisstuðulin er 1,525 mió. kr. og kr./kr. játtanin er 475.000 kr.

Samlaða játtanin upp á 7 mió. kr. skal í fyrstu atløgu brúkast til at seta tvey fólk í starv, ið skulu skipa og fyrireika menningararbeiðið. Restin av játtanini, uml. 5,5 mió. kr., skal brúkast til økismenning og tað virksemi annars, sum menningardeildin skal standa fyri.

Sostatt verður farið frá einari skipan, har økisfeløgini hava fingið íalt 1,5 mió. kr. árliga til eina hækkaða játtan upp á uml. 6 mió. kr., sum skal nýtast til menningarátøk kring landið.

**B. Fyri kommunurnar**
Nýggja uppgávu- og ábyrgdarbýtið leggur upp til, at tað frameftir verða kommunurnar, sum fara at fíggja tann partin av rakstrinum hjá kunningarstovunum, sum landið higartil hevur latið um økisferðavinnufeløgini. Talan er um ein stuðul upp á 240 t. kr. fyri hvørt av teimum seks økissamstørvunum í landinum. Fleiri kunningarstovur verða longu í dag riknar við kommunalari fígging, umframt privatari sølu, og stuðulin frá landinum er bara ein lítil partur av rakstrinum. Í Suðuroy verður stuðulin frá landinum ikki latin kunningarstovunum, men verður í staðin brúktur til ymsar verkætlanir.

Av tí at stuðulin verður latin økisferðavinnufeløgum, har fleiri kommunur samstarva um ferðavinnusamstarvið, er talan um eina lutfalsliga lítla byrðu, sum verður løgd á hvørja kommunu, vilja tær halda fram við ferðavinnuvirkseminum eftir sama leisti sum í dag.

Tað er tó eisini ein møguleiki, at onkur kunningarstova ikki fer at halda fram í sama líki sum í dag, t.d. um kommunurnar í økinum ikki megna at samstarva um at fíggja eina felags kunningarstovu. Hinvegin er tað ein fortreyt fyri eini vælvirkandi ferðavinnu, at avvarðandi partar megna at samstarva og finna felags loysnir fyri ferðavinnumenning, og eigur tað at standa kommununum rættiliga frítt at skapa nýggj samstørv, m.a. innan kunningarstovuvirksemi og at seta í verk ferðavinnuátøk, hvør sær ella í samstarvi.

Ber ikki til at byggja upp eitt slíkt samstarv, eru útlitini fyri eini vælvirkandi og burðardyggari ferðavinnu í tí økinum ikki góð, og tá kann spurnartekin setast við, hvønn mun stuðulin á 240 t. kr. ger. Mett verður undir øllum umstøðum, at tað er ein fortreyt fyri framhaldandi menning, at ábyrgdarbýtið verður greiðari, og at kommunurnar átaka sær ábyrgdina at skapa neyðugu karmarnar fyri ferðavinnumenning í ymsu økjunum í samstarvi við m.a. P/F Visit Faroe Islands.

**C. Fyri vinnuna**
Yvirskipað fer uppskotið at hava jaliga ávirkan á vinnuna. Stórt sæð allir partar í ferðavinnuni hava eftirlýst, at landið í størri mun enn higartil raðfestir ferðavinnumenningina innanlands. Tað verður ein ágóði fyri privatar íverksetar í ferðavinnuni at hava eitt stað at venda sær fyri at fáa vegleiðing, kunning og møguliga eisini fígging til at seta í gongd verkætlanirnar. Somuleiðis verður tað ein fyrimunur, at ferðavinnuvirksemið kring landið verður betur samskipað og útbygt og at líkindini fyri betri samstarvi, bæði millum privat vinnurekandi og millum almennar myndugleikar og privatar partar, er størri.

**2. Umsitingarligar avleiðingar**

Umskipanin fer at krevja, at avvarðandi partar í ferðavinnuni skulu umskipa sítt egna virksemi og finna seg til rættis í einum nýggjum leikluti. P/F Visit Faroe Islands skal menna nýggja virksemið og fær ein øðrvísi samleika enn í dag. Tað er ein umfatandi uppgáva, ið stendur fyri framman og tað fer at taka nakað av tíð, áðrenn menningartilgongdin av álvara kann byrja.

**3. Umhvørvisavleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**6. Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**
Broytingin í § 2 hevur við sær, at endamál og virksemi hjá P/F Visit Faroe Islands frameftir eisini fer at fevna um innlendis ferðavinnumenning.

Broytingin í § 7 hevur við sær, at nýggj stuðulsskipan verður sett í verk í ferðavinnuni. Hetta er neyvari lýst í almennu viðmerkingunum.

Lógarásetingin letur í stk. 1 upp fyri, at P/F Visit Faroe Islands annaðhvørt sjálvt ella í samstarvi við kommunur, kunningarstovur og privat seta í verk menningarátøk innan ferðavinnuna. Menningartiltøk eftir stk. 1 kunnu fevna víða og verður tað P/F Visit Faroe

Islands, í samstarvi við avvarðandi partar, sum ger av, hvussu menningararbeiðið verður lagt til rættis á skilabesta hátt.

§ 7, stk. 2 heimilar landsstýrismanninum at veita menningarverkætlanum í ferðavinnuni fíggjarligan stuðul. Ásetingin er grundarlagið undir nýggju stuðulsskipanini, sum er lýst í almennu viðmerkingunum og sum verður neyvari nágreinað í nýggjari kunngerð eftir § 7, stk. 5.

Stuðulin eftir stk. 2 er ætlaður til menningarátøk, sum hava við beinleiðis vørumenning at gera (t.e. t.d. nýggj ferðavinnutilboð kring landið), og útgangsstøðið fyri stuðlinum eigur at vera, at umsøkjarin sjálvur kemur við í minsta lagi helminginum av fíggingini.

**Til § 2:**
Lógin kemur í gildi 1. januar 2018.

Galdandi stuðul til økisferðavinnufeløg verður kortini galdandi til 1. januar 2019, sbr. almennu viðmerkingunum omanfyri.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 26. september 2017

Poul Michelsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen